# Ein av heimsins bestu vaskimaskinum

– nú eisini í Føroyum

Á Shellstøðini við Ringvegin í Havn




Nú eisini Á Shellstøðini í Gøtudali

**Tí er vaskimaskinan so góð:**

- Fer betri við lakkinum enn hondvask!*
- Nú við superbleytum Softtecs bustum
- Nú eisini við lakkforsegling
- Hátrýst
- Spildurnýtt botnvask

*sí www.washtec.dk



Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo | www.shell.fo


# Farloyvisstarv sum samskipari/skrivari

**fyri tíðarskeiðið 1. august 2008 og eitt ár fram.**

**Eitt starv, farloyvisstarv, sum samskipari/skrivari í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan 1. august 2008, ella eftir nærri avtalu.**

### Um starvið

Talan er um eitt starv á heilsupolitisku deildini, har tú kemur at verða við til at fyrireika mál og lættari málsviðgerð, at vera skrivari á ymsum fundum og aðrar fyrifallandi skrivarauppgávur. At luttaka í verkætlanararbeiðinum at fáa nýggja pappírleysa journalskipan til ráðið. Saman við deildarstjóra at samskipa býtið av málum á deildini, og skráseta samsvarandi hesum.

Starvið er áhugavert og menningandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við deildarstjóra og hini starvsfólkini á deildini. Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

### Førleikakrøv

Viðkomandi útbúgving. Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur.
Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni og góð evni at orða teg greitt í skrift og í talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

### Lønar- og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið ella Búskapar-og Løgfrøðingafelagið og Fíggjarmálaráðið samsvarandi útbúgving. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skulu sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

### Nærri upplýsingar

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50, ella teldupost: turid@ahr.fo.

### Umsóknarfreist

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. juli 2008, kl. 12:00.



Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

KREA